## Palmquist á Argjum

TÍÐINDASKRIV

Leygardagin 22. september fer danski psykoterapeuturin Steen Palmquist at halda skeið í Kirkju- og Missiónshúsinum á Argjum.

Heitið á skeiðnum er »Hitt ferfaldað menniskja«, og ætlanin við skeiðnum er at hjálpa fólki víðari við egnari menning.

Tað er tað diakonala arbeiðið innan Agapefelagsskapin í Føroyum, ið skipar fyri skeiðnum, og tí er framløgan og frálæran grundað á hitt kristnað sjónarmiðið.

Skeiðið byrjar kl. 14.00 og heldur fram til kl. 18.00.

Tað er neyðugt at tekna seg til frammanundan. Tilmelding fer fram á 456785, 310899 ella 42158.

## Jákup Veyhe leikstjórnar í Klaksvík



*Klaksvíkar Sjónleikarfelag er farið undir at venja skemtileikin Charles Tantu. Jákup Veyhe er leikstjóri*

**Klaksvíkar Sjónleikarfelag er farin undir at venja skemtileik, sum eisini varð spældur í Klaksvík í fimtiárunum**

SJÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Klaksvíkar Sjónleikarfelag er nú farið undir venjingarnar til skemtileikin Charles Tanta. Tað verður Jákup Veyhe, sum skal leikstjórna, og hann hevur sett hol á arbeiðið í Klaksvík.

Skemtileikurin, sum klaksvíkingar nú fara at spæla, varð eisini spældur í Klaksvík í 1954, og tá var hann sera væl dámdur.

Leikurin er ein skemtilig fløkja, har trupulleikarnir bara versna, so hvørt sum onkur roynir at finna eina loysn.

### Týddur av nýggjum

Tað er er Brandon Thomas, sum hevur skrivað leikin. Leikurin er týddur av nýggjum í sambandi við nýggju framførlsurnar, og tað er Andrias Justesen á Viðareiði, sum hevur syrgt fyri hesum.

Hann týddi eisini leikin Seks í Pyjamas, sum var serstakliga væl dámdur, tá Klaksvíkar Sjónleikarfelag spældi hann fyri tveimum árum síðani.

Farna vetur spældu klaksvíkingar Ibsenleikin Afturgongur, sum er ein álvarsleikur. Men nú eru tey farin aftur til tað, sum hevur verið vanligt í Klaksvík, nevniliga skemtileikir.

Klaksvíkar Sjónleikarfelag miðjar ímóti at frumframføra Charles Tantu fyrst í november mánaði.

# Føroyar skulu stuðla atgerðum

**Varaløgmaður heldur, at Føroyar skulu stuðla atgerðum, sum kunnu steðga altjóða yvirgangi**

POLITIKKUR
*Eyðun Klakstein*



*– Í løtuni hava vit bara onga ávirkan, og vit fáa onga beinleiðis kunning. Tí kunnu vit ikki luttaka á politiskum støði, men vit eiga moralskt at stuðla arbeiðnum at steðga altjóða yvirgangi, sigur Høgni Hoydal*

Varaløgmaður tekur undir við sjónarmiðinum hjá løgmanni um, at Føroyar skulu stuðla atgerðum, sum hava til endamáls at steðga altjóða yvirgangi.

– Vit hava onga politiska ávirkan, tí Danmark umsitir hesi øki fyri okkum, men Føroyar skulu moralskt stuðla arbeiðnum at steðga yvirgangi, sigur Høgni Hoydal.

– Høvdu vit havt fullveldi høvdu vit eisini havt politiska ávirkan og innlit. Nú mugu vit bara líta á, at Danmark kunnar okkum og umsitir okkara sjónarmið.

### Skulu verða við

Høgni Hoydal heldur, at Føroyar hava skyldur mótvegis okkara grannlondum og tí parti av heiminum, sum vit eru partur av.

– Hesar skyldur skulu vit eisini liva upp til, tá vit fáa fullveldi. Vit hava eisini gjørt greitt, at vit vilja virka fyri, at vit ikki eru nakar trygdarvandi fyri okkara øki, sigur Høgni Hoydal.

– Í løtuni hava vit bara onga ávirkan, og vit fáa onga beinleiðis kunning. Tí kunnu vit ikki luttaka á politiskum støði, men vit eiga moralskt at stuðla arbeiðnum at steðga altjóða yvirgangi.

# Næraberg liggur við maskinbreki



*Næraberg liggur við maskinbreki. Ein dampketil skal umvælast, og tí sleppur trolarin ikki til fiskiskap aftur fyrr enn um eina góða viku*

**Stóri svartkjaftatrolarin sleppur ikki aftur til fiskiskap fyrr enn um eina góða viku**

FISKISKAPUR
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Næraberg kom mánadagin til Klaksvík við maskinbreki, og stóri trolarin verður liggjandi við kai í minst eina viku afturat.

Orsøkin til hetta er, at ein dampketil umborð kókaði tómur undir seinasta túri, og tá hesin ketil verður brúktur til mjølframleiðsluna umborð, má hann umvælast. Hendan umvælingin fer at taka eina góða viku afturat.

Næraberg hevði stívliga 600 tons av surimi og eini 350 tons av mjøli, nú hann noyddist til lands.

Sundaberg hevur eisini verið í Klaksvík í vikuni. Hann legði sløk 200 tons upp í Klaksvík, sum hann hevur fingið farnu seks vikurnar.

Nú er Sundaberg á beding á Skála, og tá hann er liðugur har, verður leiðin løgd til Labrador, har JFK hevur keypt svartkalvakvotu frá kanadiumonnum.

# Gera vegir í stand

**Landsverkfrøðingursin er nú í gongd við at asfalterað slitnar vegir í Klaksvík**

**Klaksvík:** Hesa vikuna hava fólk frá Landsverkfrøðinginum sett gongd á asfelteringina í Klaksvík.

Nógv vegastrekki í Klaksvík eru illa slitin, og tað verða fleiri av vegum,sum nú verða settir í stand.

Tað eru meira enn tvær vikur síðani, at maskinur hjá Landsverkfrøðinginum tóku restirnar av gamla asfaltinum oman av vegnum, og hesa vikuna var farið í gongd við at leggja nýtt asfalt á vegirnar.

Samanlagt skulu einir 28.0000 fermetrar asfalterast av nýggjum, og hetta arbeiðið verður gjørt næstu tíðina.

Millum økini, sum skulu asfalterast, eru vegirnir á Brekku, Undir Hálsi, Víkavegur, Faktorsvegur, Mylnutún og Niðan Horn.

Tørvurin á asfaltering er stórur, og alt arbeiðið verður ikki gjørt í fyrstu syftu.

***ek***



# BP borar eina viku aftrat

**Boringin í Svínoyarbrunninum hevur ikki gingið heilt so glíðandi, sum BP hevði ætlað. Tekniskir trupulleikar eru orsøkin til, at teir fara at bora í enn eina viku. Ætlanin var at annars at røkka endaliga málinum hesa vikuna. Herfyri mistu teir eitt mátitól í boriholinum. Tað fekst ikki uppaftur. Avleiðlingin bleiv, at proppur mátti setast í holið og er farið at bora nýggjan brunn á góðum 4000 metra dýpi**

OLJULEITING
*Jan Müller*



*Sovereign Explorer verður latin Amerada Hess tíðliga í næstu viku*

Trupulleikar av ymsum slag hava gjørt, at tað hevur tikið væl longri tíð enn ætlað hjá BP og Shell at bora sín fyrsta brunn á føroyska landgrunninum. Boringin, sum byrjaði nakað undan ólavsøku, skuldi havt verið liðug seinnu helvt av august ella um mánaðarskiftið august-september men var orsakað av tekniskum trupulleikum sett til at enda 12. til 15. september. Nú sær ikki mætari út enn, at tann tíðarætlanin ikki fer at halda heldur. Hjarnar Djurhuus, stjóri hjá BP, sum avgjørt einki vil siga um úrslitið av boringini higartil, sigur tó so mikið við Sosialin, at teir rokna við at skula bora í eina viku aftrat.

Teir hava verið rættiliga óhepnir, og hava verið tarnaðir av ymsum viðurskiftum. Herfyri mistu teir eitt umleið 30 metrar langt mátitól í sjálvum boriholinum. Tá tað ikki eydnaðist at fáa tað upp aftur var lítið annað at gera enn at sementera tað fast og proppur varð settur í holið. Tí hava tey á West Navion verið noydd til at bora ein nýggjan brunn við síðuna av hinum. Hesin gongur meira til síðuna og skilst, at tað verður farið eftir »onkrum« teir halda seg »síggja« í undirgrundini. Um hetta er endaliga málið, sum kósin hevur verið setti eftir frá byrjan ella okkurt heilt annað er ilt at siga. Sosialurin skilur, at enn resta gott og væl 500 metrar í at koma á mál. Borað hevur eisini verið gjøgnum nakað harðari tilfar og tá lagt verður um til eina sonevnda »sidetrack« boring gongst seinri.

BP og Shell fóru undir boringina 23. juli og gongur góð vika aftrat, so hevur henda boringin tikið nærum tveir mánaðir, og tað er rættiliga nógv longri enn ætlað og mett varð frá byrjan. Hetta dýrkar tí alla verkætlanina rættiliga nógv. Bara mátitólið, sum varð mist í boriholinum, kostaði knappar 20 mill. kr.

Enn er einki likið út um úrslitið av BP boringini. Men tær gitingar og metingar, sum hava verið frammi, eru, at vónirnar til fyrsta málið hildu ikki men kortini skal boringin hava verið meira væleydnað enn tann hjá Statoil, tí borurin hjá West Navion skal vera komin fram á fleiri áhugaverd oljuspor. Spurningurin er so, hvat henda seinasta vikan kann geva. Hóast trupulleikar er framvegis møguleiki fyri at gera fund. Soleingi boringin heldur fram er hesin møguleikin til steðar. Um okkurt av týdningi longu eru funnið er so fyribils ein loynidómur hjá BP og Oljumálastýrinum.

### Týdning at gera fund

Fyri BP hevur eitt fund nú á føroyska landgrunninum rættiliga stóran týdning. Miðjað verður móti at økja munandi um samlaðu framleiðsluna komandi árini, og hetta er eisini tí, at BP satsar nógv uppá at gera ikki bert eitt men tvey fund á økinum miðskeiðis millum Føroyar og Hetland. Tá boringin við Føroyar er liðug verður alt fyri eitt farið um markið í bretskt øki at bora ein brunn av nakað sama slag sum tann føroyski. Endamálið hjá BP og Shell er – verður olja funnin báðumegin markið – at fara undir eina skjóta útbygging av báðum feltum um somu tíð, soleiðis at olja frá teimum feltunum kann koma á marknaðin um minni enn 5 ár. Hetta hevði kunnað økt munandi um samlaðu framleiðsluna hjá BP og hevði tað eisini kunnað minkað óttan hjá Bretlandi at skula gerast innflytari av olju um ikki so nógv ár. Nettupp tí hevur øll oljuleitingin á Atlantsmótinum alstóran týdning fyri risastóra granna okkara.

### Statoil liðugt

Hjá Statoil, sum herfyri boraði turran brunn á landgrunninum, eru teir nú við at verða lidnir at rigga av. Rúni Hansen sigur, at teir møguliga longu mánadagin ella fyrst í næstu viku kunnu lata Amerada Hess boripallin Sovereign Explorer. Tá verða akkerini tikin upp og pallurin siglir teir umleið 20-30 fjórðingarnar móti markinum, har Amerada Hess, sum operatør fyri Faroes Partnership samtakið tekur yvir. Amerada Hess hevur júst fingið borigóðkenning og verður borurin helst sett í undirgrundina seint í næstu viku. Tann brunnurin hevur fingið navnið Marjun. Tað eru fleiri jarðfrøðingar, sum Sosialurin hevur tosað við, ið halda, at henda boringin verður kanska tann mest spennandi og avgerandi, tí sjálvt leitimodellið er meira klassisk enn tey hjá bæði Statoil og BP. Farið verður eftir einum risastórum strukturi, eini sokallaðari kullu á góðum 4000 metra dýpi. Tað rættiliga áhugaverda við hesum strukturinum er eisini, at hann er eisini á bretskum øki. So verður olja funnin er sannlíkt, at talan er um eitt felt, sum bæði føroyingar og bretar hava rættin til. Uppaftur meira áhugavert er, at tað er júst sama oljusamtakið við Amerada Hess á odda, sum hevur fingið leitiloyvi til teigin hinumegin markið.

# Serligur 14. september

**55 ára dagurin fyri fólkaatkvøðuni í 1946 varð brádliga orsaka av yvirganginum í USA lýstur at vera føroyskur sorgardagur. 14. septemberhaldini hjá Tjóðveldisflokkinum verða merk av hesum, sigur Høgni Hoydal**

SORGARDAGUR
*John Johannessen*



Minnisdagurin fyri fólkaatkvøðuna í 1946 verður í ár eitt sindur ørðvísi enn vanligt.

Orsøkin er, at løgmaður hevur boðað frá, at vit, eins og restin av vesturheiminum, skulu lýsa dagin sorgardag, til minnist um herviliga yvirgangin í USA 11. september.

Men 14. septemberhaldini, sum Tjóðveldisflokkurin og Unga Tjóðveldið fyri langari tíð síðani hava lagt til rættis, verða kortini hildin, sum ætlað.

– Vit fara tó sjálvandi at hava tað í huga, sum er hent í USA. Og eisini fara vit at halda tøgn til minnis um ræðuleikarnar, sigur Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisfloksins.

Eisini Javnaðarflokkurin fer at seta tíð av á landsfundi sínum, sum byrjar fríggjakvøldið 14. september, til at minnast sorgarleikin í USA.

– Ein landsfundur er eitt størri tiltak, sum nógv fólk eru við til at fyrireika. Tí er tað ikki so lætt at avlýsa landsfundin. Men sum øll onnur politisk forum hava gjørt seinastu dagarnar, fara vit at umrøða hendingarnar, minnast tey farnu og virða tey við tøgn, sigur Jóannes Eidesgaard.

14. september er lýstur sorgardagur í øllum Evropa.